# Námsfrøðiliga leiðslan hjá tveimum føroyskum skúlaleiðararum

*Jóhannes Miðskarð, PhD og adjunktur í leiðslu á barna-, ungdóms- og serstovnaøkinum á námsvísindadeildini á Fróðskaparsetrð Føroya*

*Til tess at varpa ljós á námsfrøðiliga leiðslu í føroyskum skúlum havi eg í granskingarverkætlanini "Námsfrøðilig leiðsla í føroyskum fólkaskúlum (NLFF)" kannað, hvussu føroyskir skúlaleiðarar útinna námsfrøðiliga leiðslu bæði út frá sjónarhornunum hjá skúlaleiðarum og lærarum. Eitt av endamálunum við hesari verkætlanini var at finna dømir um, hvussu námsfrøðilig leiðsla verður framd í verki í Føroyum til tess at kveikja aðrar skúlaleiðarar at seta meira fokus á teirra námsfrøðiligu leiðslu. Í hesari greinini fari eg at vísa, hvussu tveir skúlaleiðarar útinna sína námsfrøðiligu leiðslu.*

Eg nýtti kvalitativt háttalag til hesa granskingarverkætlanina, har eg framdi semistrukturerað kvalitativ interview við bæði skúlaleiðarar og lærarar. "Semistrukturerað interview" merkir, at eg frammanundan interviewini hevði fyrireikað nøkur evnir, sum eg ætlaði at spyrja um – men at eg samstundis í interviewunum var opin fyri, at okkurt óvæntað varð tikið fram, sum eisini var áhugavert hjá mær at spyrja meira um viðvíkjandi námsfrøðiligari leiðslu.

Eg nýtti eitt fyribrigdarfrøðiligt (fenomenologiskt) háttalag til tess at fremja og greina interviewini. Sambært fyribrigdarfrøðini er tað týdningarmikið, at eitthvørt fyribrigdi hongur tætt saman við, hvussu fólk uppliva fyribrigdið. Hetta vil siga, at tað ikki er møguligt at kanna námsfrøðiliga leiðslu leyst frá teimum persónum, ið útinna ella

uppliva námsfrøðiliga leiðslu. Í granskingarverkætlanini varð tí lagdur dentur á at kanna, hvussu skúlaleiðararnir og lærararnir subjektivt út frá teirra lívsverð hava upplivað námsfrøðiliga leiðslu í verki. Hetta merkir tó ikki, at kanningin bert ger sjónligar subjektivar uppfatanir av námsfrøðiligari leiðslu; harafturímóti ber fyribrigdarfrøðiliga hugtakið "lívsverð" við sær, at menniskju liva í einari felagsverð. Tað er avgerandi fyri fyribrigdarfrøðina, at fatanin hjá tí einstaka er grundað í, at hennara/hansara "lívsverð" er myndað í og av einum sosialum, mentanarligum og søguligum konteksti (Justesen og Mik-Meyer, 2010, s. 23). Júst fyribrigdafrøðiliga fokusið á at royna at skilja fyribrigdið "námsfrøðilig leiðsla" út frá lívsverðini hjá heimildarfólkum, ið virka saman í einum felags sosialum, mentanarligum og søguligum konteksti, hóskar seg væl til hesa granskingarverkætlan, ið hevur til endamáls at royna at skilja, hvussu ávikavist ein skúlaleiðari og lærarar á einum skúla uppliva ymiskt, hvussu skúlaleiðarin útinnir hansara námsfrøðiligu leiðslu. Her eri eg eisini hugkveiktur av Hannah Arendt, ið eins og fyribrigdarfrøðin sigur, at eitt og hvørt fyribrigdið er altíð knýtt saman við, hvussu fólk uppfata tað (Arendt 1978, p. 26). Arendt undirstrikar tó staðiliga, at sjálvt um eitt og hvørt menniskja altíð uppfatar eitt fyribrigdi upp á ein serstakan máta, so ber tó til at fáa eina vitan um fyribrigdið við at fáa ymisk sjónarhorn at renna saman (Arendt, 1958, p. 57).

Í NLFF interviewaði eg skúlaleiðarar og lærarar á fýra ymiskum skúlum. Eg valdi teir luttakandi skúlarnar út frá, at eg havi fingið eina hóming av, at skúlaleiðarin hevur væleydnaðar royndir við námsfrøðiligari leiðslu; hesa hóming havi eg frá mínum práti við nógvar lærarar, og tí at eg havi havt starvslærulesandi innan leiðslu á skúlunum. Mín útveljing av hesum skúlaleiðarum er í samsvari við tað, sum Cohen, Manion og Morrison (2011) nevna fyri ætlað útveljing ('purposive selection'). Í ætlaðari útveljing velur man sum granskari interviewpersónarnar út frá einari meting av, at interviewpersónarnir hava tað eyðkenni, ið man ynskir at kanna.

Í greiningini av interviewtilfarinum er hermeneutiski ringurin nýttur, har sjóneykan verður sett á sambandi millum partseindir og heildina í interviewunum. Tí eru fyrst

interview-útskiftirnar lisnar í sínari heild. Síðani eru meiningskondenseringinar gjørdar av útvaldum partseindum, har endamálið hevur verið at funnið fram til meginmeiningina hjá interviewpersónunum í partseindunum. Til seinast eru interview-úrskriftirnar aftur lisnar í síni heild, har kannað varð, um funnu meiningarnar í partseindunum svaraðu til høvuðsinnihaldið í interviewunum. (Alvesson & Sköldberg, 1994).

Tá eg niðanfyri skrivi um útsagnir hjá interviewpersónunum, er tað onkuntíð, at eg endurgevi beinleiðis brot úr interviewunum, og onkuntíð nýti eg meiningskondenseringar. Tað er týdningarmikið at undirstrika, at allir persónar mest møguligt eru dulnevndir. Hetta merkir, at í fyrsta umfari eru øll nøvn duld. Í øðrum umfari eru eisini onnur sereyðkennir broytt (eitt dømi kundi verið, at eg havi broytt flokstigið, har ein lærari undirvísir); eg havi tó bert broytt ymisk viðurskiftir, sum ikki hava víst seg at hava týdning í greiningini. Eitt annað, ið eg brúki fyri at halda dáturnar dulnevndar, er, at eg umtali skúlaleiðaran og lærararnar í kallkynsformi, sjálvt um bæði kynini vóru umboðað í kanningini.

## Tað fyrsta dømið um námsfrøðiliga leiðslu

Tann eini skúlaleiðarin, har eg kannaði námsfrøðiligu leiðslu, sigur, at hann leggur upp til, at hann og lærararnir tosa regluliga um, hvønn profil tey hava á skúlanum. Skúlaleiðarin fortelur í hesum sambandi, at á teirra skúla er profilurin at leggja stóran dent á at arbeiða við føroyskari mentan og náttúru. Skúlaleiðarin sigur: "*Vit arbeiða við tí frælsa orðinum, søguni, mentanini og sálmarnir. Altso, hvør eru vit? Altso, hvar koma vit frá? Hetta her við at føroyinga søga (...) Eisini arbeiða vit við at fáa náttúruna inn í skúlan, og skúlan út í náttúruna.*"

Skúlaleiðarin heldur fram við og sigur, at hann eisini regluliga tekur mál upp við lærararnar, sum meira beinleiðis viðvíkja undirvísingini. Eitt dømi er, at fyri nøkrum árum síðani høvdu hann og nakrir lærarar eitt uppskot um, at fýra teir fyrstu tímarnar altíð skuldu liggja saman tveir og tveir; har tað so aftaná var eitt langt fríkorter. Hetta var dúgliga skift orð um, og so samdust skúlaleiðarin og lærararnir um at royna at seta

hesa skipan í verki. Eitt annað dømi er, tá leiðarin setti sær fyri at varpa meira ljós á lesiundirvísingina, tí sum hann sigur "*Lesiførleikin er altavgerandi (...) og tað føli eg meg sannførdan um, at vantandi lesiførleiki hjá nógvum næmingum í Føroyum, tað er grundin til, at teir klára seg so illa í náttúruvísindi í PISA. Teir skilja ikki, hvat stendur har*." Skúlaleiðarin varpaði ljós á lesiundirvísingina á námsfrøðiligum fundum við m.a., at allir lærararnir skuldu lesa somu grein um lesiundirvísing, sum tey so skiftu orð um.

Tá eg spurdi tann eina læraran, so sigur hann, at eitt, sum eyðkennir skúlaleiðaran, er, at hann hevur altíð nógvar tankar og ætlanir. Lærarin fortelur, at skúlaleiðarin altíð hevur eina verkætlan koyrandi, t.d. eina tíð vildi hann betra um lesiundirvísingina, tí hann helt at fakliga støðið var ov lágt, og eina tíð vildi hann fáa starvsfólkini at hugsa um teirra góðu og keðiligu siðvenjur. Lærarin fortelur eisini stutt um, at skúlaleiðarin ofta kemur við evnum, ið hava við føroyska mentan og náttúruna at gera.

Tá eg spyrji hin læraran, so sigur hann: *"[Skúlaleiðarin] hevur visiónir við skúlanum, hann vil nakað pedagogiskt. Altso hann vil hava, at skúlin skal hava ein pedagogiskan profil."* Tá eg spyrji læraran um, hvør hesin pedagogiskur profilur er, sigur hann, at tað snýr seg um føroyska mentan og náttúruna; lærarin nevnir m.a., at tað er vanligt, at tey seta eplir niður við næmingunum. Lærarin sigur: *"tað engagerar lærararnar um eitt felags - um eitt felags projekt, og tað er eisini spennandi fyri næmingarnar, sum uppliva tað, at at tað hendir nakað eyka, og ikki, ikki bara at tey bara eru glað, men alt tað praktiska arbeiðið, sum er rundan um tað. Tað er, tað er spennandi."*

Lærarin fortelur víðari, at skúlaleiðarin onkuntíð setir sær eitthvørt fyri viðvíkjandi undirvísingini. Hann sigur: *"Altso [skúlaleiðarin] setir seg inn í pedagogisk ting altso, og og t.d. hetta her, eitt, sum vit hava arbeitt øgiliga nógv við tey fyrstu árini, tað var lesiinnlæring, hvussu man lærir børn at lesa - ha?! Tað bleiv líka sum sett á skinnarar ein, ein planur um, hvussu menna vit lesingina, og at lærararnir blivu stuðlaðir til at fara á skeið. Hann setti seg, í hvussu er setti seg inn í tingini, ja, ja, eg vil ikki siga, eg vil, eg vil ikki siga, at endiliga hann var langt inni í, men hann, í*

*hvussu er, setti seg inn í tey grundleggjandi. Hann setti tað líka sum á sporið, at vit tryggja okkum tað, at øll børn læra at lesa, áðrenn tey eru liðug við 3. flokk".*

Sum sæst omanfyri, so er semja um hjá øllum trimum um, at skúlaleiðarin regluliga tekur upp ymisk viðurskifti viðvíkjandi undirvísingini. Víðari kann sigast, at tað er semja millum skúlaleiðara og lærararnar um námsfrøðliga profilin hjá skúlanum, sum snýr seg um føroyska mentan og náttúruna. Hopkins (2002, s. 56) leggur dent á tað at orða ein profil fyri skúlan sum eitt týdningarmikið øki í námsfrøðiligari leiðslu. Hartil kann viðmælast út frá Harris, Day, Hopkins, Hadfield, Hargreaves og Chapman (2002, s. 56), at í námsfrøðiliga profilinum hjá skúlanum verður eisini tikið við, afturat føroysku mentanini og náttúruni, okkurt ynski um støðugt at betra um undirvísingina. Tað er, sum vit hava sæð, eisini er eitt av hjartamálunum hjá skúlaleiðaranum.

Skúlaleiðarin sigur, at hann heldur, at tað er týdningarmikið at hava ein góðan struktur á tí námsfrøðiliga arbeiðinum, og her metir hann, at hansara arbeiði í námsfrøðiliga ráðnum er avgerandi í hansara námsfrøðiligu leiðslu. Hann fortelur, at longu áðrenn ársbyrjan eru allir fundir í námsfrøðiliga ráðnum settir á skrá, og leiðarin ger sera nógv fyri, at fundirnar í námsfrøðiliga ráðnum verða hildnir til ásettu dagfestingarnar. Leiðarin sendir fundarfráboðan út áðrenn hvønn fund og spyr samstundis, um lærararnir hava okkurt punkt, sum teir kundu hugsað sær at tikið upp.

Tá eg spyrji skúlaleiðaran, hví hann heldur, at tað er avgerandi, at hann í sínari námsfrøðiligu leiðslu nýtir fundirnar í námsfrøðiliga ráðnum, so svarar hann, at tað er tí, at hann heldur, at tað er so týdningarmikið at fáa lærararnar við, tá hann hevur okkurt námsfrøðiligt hugskot, sum skal setast í verk. Skúlaleiðarin sigur: "*Altso, vissi tað kemur ófriður í ein skúla. Tað havi eg upplivað. Tað er nakað forferdiligt. Vissi tú risikerar, at tú fært mótvilja. Tað er heilt, altso heilt forferdiligt. Altso, hann, sum hevur upplivað tað sum stjóri, hevur uppdagað, at eg makti einki móti samlaða bólkinum av lærarum. Tað má man bara gera sær greitt. Vissi tey seta seg upp á bakbeinini, bara trý seta seg upp á bakbeinini ordiligani, so eru tey trý móti einum. Tað skal man hava respekt fyri, at tú ikki, at tú ikki kemur í for sterkan andróður."* Her

undirstrikar skúlaleiðarin, hvussu torført tað er, at hann sum leiðari kemur í andróður við lærarahópin. Tí hevur hann sett sær fyri, at hann og lærararnir altíð mugu tosa saman, áðrenn eitt hugskot verða framt í verki.

Tann eini lærarin fortelur, at skúlaleiðarin er ein, sum altíð skiftir orð við lærararnar, áðrenn hann tekur nakrar avgerðir. Lærarin nevnir eitt dømi, at tað eina árið gjørdist ein flokkur so stórur, at hann kundi verið býttur sundur í tveir flokkar, men skúlaleiðarin helt, at tað var skilabest, at flokkurin var verandi sum ein flokkur, har sum fleiri lærarar vóru inni. Men tá skúlaleiðarin spurdi avvarðandi lærarar, so hildu teir, at tað var best at býta sundur í tveir flokkar. Síðani samtalaðu skúlaleiðarin og lærararnir leingi um teirra ymsu meiningar. Til endans var skúlaleiðarin sannførdur um, at tað var rætt at gera, sum lærararnir søgdu, og so býttu tey flokkin sundur í tvey. Lærarin sigur, at samskiftið við leiðaran *"upp á tann mátan er tað nokkso nokk so demokratiskt altso, tað var var ymiskar grundir til, at lærararnir ynsktu at býta børnini sundur, og tað bleiv gjørt".*

Hin lærarin sigur eisini, at tað, sum eyðkennir skúlaleiðaran, er, at hann lurtar sera væl eftir, hvat starvsfólkini siga og tekur væl ímóti, um tey hava hugskot til at betra um okkurt. Í interviewinum er hetta brotið: *"Lærarin: Skúlaleiðarin trýr upp á demokrati, fólkaræði. Øll skulu kunna koma til orðanna, og øll skulu hoyrast. Men onkuntíð er tað soleiðis: "Á, kanst tú ikki bara siga, hvat vit skulu, behøvast vit virkuliga at sita ígjøgnum alt hetta her". Interviewari: Ja, so hann vil ofta hoyra tykkara meiningar? Lærarin: Ja. Hann vil hoyra okkara meiningar. Onkuntíð havi eg sagt við hann: "At tú tímir at spyrja um hasar meiningarnar. Altso kanst tú ikki bara skera ígjøgnum, og siga, hvat vit skulu ha?!" Ja, men eg veit ikki, hann trýr upp á tað, at at fólk skulu kunna siga sína hugsan.*"

Interviewbrotini hjá lærarunum omanfyri vísa, at leiðsluhátturin hjá skúlaleiðaran kann lýsast sum ein demokratiskur leiðsluháttur, har hansara samrøða við lærararnar er avgerandi fyri, hvør avgerð verður tikin. Tann eini lærarin sigur, at henda gongdin kann gerast møðsom. Tað er vert at undirstrika, at politiski ástøðingurin Hannah

Arendt staðfestir, at slíkar samrøður, har man roynir at finna semjur millum ymsar partar, eru langdrignar. Men hon letur onga iva verða um, at hetta er einasta leið at ganga. Hon sigur, at vit mugu ásanna, at eitt grundkor í hesum heimi er, at vit menniskju eru plurarististisk, t.v.s. at einstøku menniskjuni altíð hava ymsar ætlanir og ymisk sjónarhorn í eini felags sak, og tí er tað eitt stórt arbeiði  at finna eina felags loysn. (Arendt, 1958).

Tað er eisini vert at hava í huga, at sambært Arendt er ein sovorðin samrøða ikki bert ætlað til at finna eina felags loysn. Arendt leggur stóran dent á, at slíkar samrøður við nógvum sjónarhornum eisini eru við til, at einstøku fólkini síggja, hvussu onnur fólk hugsað øðrvísi enn tey sjálvi. Arendt sigur, at harvið er tað tí møguligt ígjøgnum slíkar samrøður at vaksa um egið sjónarhorn við at læna innlit frá hvørjum øðrum. (Miðskarð, 2012, s. 86ff).

Skúlaleiðarin fortelur eisini um, at tað er hansara uppgáva, at á skúlanum valdar ein felags konsensus til nøkur viðurskiftir, t.d. atburð og atferðrartrupulleikar hjá næmingunum. Skúlaleiðarin sigur: "*Tað ber ikki til, at ein lærari sigur eitt, og so er ein lærari har, sum sigur eitt annað. Tað er í hvørt fall eitt av tí, sum eg havi roynt at arbeitt við, tað er, at tey uppliva, at skúlin sigur tað sama. Men sjálvandi tað ger hann jú ikki heilt - ha? Tí tí tvey fólk siga ongantíð tað sama ha? Men, at tað er ein vissur konsensus*." Hetta interviewbrotið vísir, at skúlaleiðarin heldur, at tað er týdningarmikið, at allir lærarar draga somu línu, tá atferðartrupulleikar eru.

Leiðarin fortelur, at hann leggur eisini upp til, at námsfrøðilig og sálarfrøðilig vitan kemur í spæl, tá tey samskifta um atburð hjá næmingum. Skúlaleiðarin sigur: *"...at ein næmingur er, hvussu kann man siga?, eh óskikkiligur, tað orðið, tað vil eg slett ikki hava. Vit skulu hava eitt professionelt orð, altso eisini, at man lærir seg í at siga professionelt um tað, sum barnið ger, at tað er frustratiónir og tað er manglandi motivatión, at tað er tey tingini, vit tosa um."*

Skúlaleiðarin segði omanfyri, at hann legði dent á, at tað var ein konsensus millum lærararnar, og tí spurdi eg fyrst tann eina læraran, um hann helt, at tað var ein felags

andi á skúlanum. Í interviewinum er hetta brotið: *"Lærarin: Ja, tað vil eg siga, ja. Interviewari: Og hvat er tann andin? Felags andin? Lærarin: Nei, altso rundan um alt hetta her, sum eg snakki um, við disiplin".*

Tá eg spurdi hinar lærararnar um hetta við ein felags konsensus, so sigur lærari 2:" *Ja, eg, altso eg veit ikki ordiliga, hvussu hvussu eg skal lýsa tað, tað er eitt eitt ella annað felags forstáilsi, at, at, hvussu vit dríva, eh, dagliga undirvísing, hvussu vit eru úti í fríkorterinum, og hvussu man, sum garðvakt, altso tað er, tað er ein sovorðin felags konsensus, og so, ella vit vit samskifta um at vit hava ein felags, tað er ikki soleiðis, at ein ger eitt, eh, tá hann hevur garðvakt, og ein ger púra tað mótsatta, at manl íka sum, man hevur eina felags..máta at vera uppá."*

Sum víst omanfyri, so váttar hesin lærarin, at tað er ein felags konsensus á skúlanum viðvíkjandi truplum atburði hjá næmingum. Eg gjørdist áhugaður í at kanna, hvønn leiklut hesin lærarin heldur, at skúlaleiðarin hevur í konsensusinum, har lærarin svarar mær: "*Ja, hvussu skal eg forklára tað? (...) eh, kanska serliga tey fyrstu árini, tá, tá haldi eg, hann legði øgiliga stóran stóran dent á nøkur ting, altso at, sum hvussu tú sum vaksin uppførir teg millum børn. Altso tú rópar ikki, altso tú, tú tvingar ikki tín, tín vilja ígjøgnum við børnunum. Tú, eh, tú tosar við tey, altso vissi tað eru trupulleikar, so tosar tú fyrst. Vissi tað ikki hjálpir at tosa, so vendir tú tær bara til foreldrini. Altso, vit hava tað, sum man kallar fyri mannagongdir, altso innan fyri.., hvussu man fær børn til at til at uppføra seg ordiligt altso, man hevur nakrar fastar mannagongdir, fyrst tosar tú við barnið, vissi tað ikki hjálpir, ja, so tosar tú við foreldrini um tað, næsta stigið, vissi tað ikki hjálpir, ja, so so tekur tú leiðaran uppí, og tú veitst, og tað fjórða kanska, ella fimta stigið, tað er, at tú, nú, nú líka, nú mást tú innkalla til fund ha? Altso vit hava nakrar fastar mannagongdir og er tað ásett. Interviewari: Í onkrum skrivligum skjali? Lærarin: Ja, tað er ásett. Vit hava, tá tað kemur til sovorðni ting, ha? Vissi vissi eitt barn hevur trupulleikar við atferð, so hava vit púra fasta mannagongd, mannagongdir, tað hevur [skúlaleiðarin] líka sum stungið út í kortið. Ella, vit hava, tað hava vit stungið út í kortið í felag - ha? Saman við*

*honum, og sovorðni ting, haldi eg, hann hevur lagt stóran dent á, at tú gert ikki akkurát upp á tín máta, og ein annar ger upp á ein annan máta, vit hava ein felags leist."* Lærarin fortelur her, at teirra felags konsensus tekur útgangsstøði í einum skjali, ið lýsir fastar mannagongdir í atferðartruppulleikum. Men eisini kann staðfestast, at skúlaleiðarin hevur gingið á odda við at sýna starvsfólkunum, at í atferðrartrupulleikum eigur ein lærari at tosa í virðing við næmingarnar. Vit síggja eisini í interviewbrotinum, at leiðarin hevur nýtt sín demokratiska leiðslustíl í gerðini av skjalinum um mannagongdir.

Sum heild kann sigast, at skúlaleiðarans námsfrøðiligi leiðslustílur miðsavnar seg um tvey økir, ið beinleiðis ávirka næmingarnar. Tað fyrsta økið er, hvussu skúlaleiðarin í samsvari við námsfrøðiliga profilin demokratiskt leiðir lærararnar. Tað seinna økið er, hvussu skúlaleiðarin leggur dent á, at lærararnir hava ein felags konsensus til atferðartrupulleikar.

Sambært Moos (2003) er ongin ivi um, at lærarar eru ógvuliga sjálvstýrandi, og at tað tí er ein avbjóðing at stýra lærarum - í so máta kann sigast, at skúlaleiðarin ber seg rætt at, við at hann tekur atlit til læraranna meiningar, tí um skúlaleiðarin bara stýrdi einsamallur, so var hann allarhelst ofta komin tvørs fyri í mun til sjálvstýrandi lærararnar. Eisini kann sigast, at tá skúlaleiðarin tekur námsfrøðiligar leiðsluavgerðir í samráð við lærarar, so kemur hann nærri næmingunum og teirra gerandisdegi.

Eg fari nú at greiða frá námsfrøðiliga leiðsluháttinum hjá tí næsta skúlaleiðaranum, ið eg kannaði til NLFF-granskingarverkætlaninna.

### Tað næsta dømið um námsfrøðiliga leiðslu

Hesin skúlaleiðarin og tann eini lærarin lýsa næstan eins, at útinta námsfrøðiliga leiðsla skúlaleiðarans yvirordnað kann býtast í tvey. Fyri tað fyrsta, at næmingarnir skulu trívast í skúlanum, og fyri tað næsta, at næmingarnir skulu klára seg so fakliga væl sum til ber. Skúlaleiðarin sigur: *"Altso, eg vil gjarna skapa ein skúla, har tað er trygt at vera. Har sum øll trívast - bæði børn og vaksin. Har vit taka hond um hvørt einstakt barn. Og tá meini eg virkuliga eisini øll. Eisini tey, sum ikki hava fingið fullan*

*førleika. Men at vit samtíðis eru øðiliga bevíst um, at hesi børn skulu víðari. Vit skulu gera tey fakliga so væl sum møguligt, klár til at klára seg so væl, sum til ber."*

Tá eg spyrji skúlaleiðaran og læraran um virðisgrundarlagið hjá skúlanum, svara báðir, at tað er, at trivnaðurin skal vera góður, og fokus skal eisini vera á fakliga menning. Hin lærarin minnist ikki, hvat virðisgrundarlagið er, og heldur ikki, at skúlaleiðarin hevur hetta ofta á tungu. Eisini kann staðfestast, at hesin lærarin dugir ikki at seta greitt orð á, hvussu man yvirorðnað kann lýsa, hvussu skúlaleiðarin útinnir sína námsfrøðiliga leiðslu, men heldur lýsir hann nøkur einstøk leiðsluvirksemi. Meira kann lesast um, tá lærarar hava ymisk sjónarhorn í Miðskarð (in review).

Skúlaleiðarin og tann fyrri lærarin fortelja, at fyri teimum sýnist tað, sum at skúlaleiðarin í sínari útinnan av sínari námsfrøðiligu leiðslu leggur stóran dent á, at øll skulu trívast á skúlanum, at man skal taka sær av hvørjum øðrum, og at pláss skal vera fyri øllum – eisini teimum við serligum avbjóðingum.

Skúlaleiðarin og lærarin fortelja, at ein liður í at betra trivnaðin er, at skúlaleiðarin leggur stóran dent á, at skúlin hevur nøkur góð tiltøk fyri allan skúlan. Á skúlanum hava tey flaggdagshald, jólahald, føstulávintshald og eina veitslu fyri næmingunum í framhaldsdeildini. Harafturat heldur skúlaleiðarin, at tann dagligi morgunsangurin er týdningarmikil fyri trivnaðin á skúlanum, tí har eru tey øll saman, og so er morgunsangurin eitt høvi at geva felags boð og at geva onkrum eitt herðaklapp, t.d. plagar skúlaleiðarin at markera, at ein lærari hevur tikið eina eyka útbúgving.

Allir tríggjar interviewpersónarnir tosa um, at hjá skúlaleiðaranum er altíð "ein opin hurð" – bæði fyri lærarum, næmingum og foreldrum. Allir interviewpersónarnir siga, at skúlaleiðarin sigur regluliga á námsfrøðiligum fundum, at hansara skrivstova altíð er opin fyri lærarunum.

Viðvíkjandi tí "opnu hurðini", so sigur tann eini lærarin, at skúlaleiðarin er altíð góður at koma til, um man vil tosa um okkurt í samband við undirvísingina, ella um onkur trupulleiki er við einum næmingi (lærarin sigur, at í slíkum føri er tað serliga gott at

koma til skúlaleiðaranum, tí hann kennir allar næmingarnar á skúlanum). Lærarin nevnir, at skúlaleiðarin eisini er góður at koma til hjá næmingum og foreldrum. Skúlaleiðarin er ógvuliga opin og vil altíð fegin hjálpa. Hin lærarin sigur, at leiðarin dugir væl at lurta, og dugir væl at tosa.

Allir tríggir interviewpersónarnir siga, at skúlaleiðarin ynskir, at skúlin skal fakliga vera væl fyri. Allir interviewpersónar nevna, at til tess at seta fokus á tað fakliga, so nýtir skúlaleiðarin landsroyndirnar. Harafturat sigur tann eini lærarin, at skúlaleiðarin nýtir prátið um ársætlaninar til at seta fokus á tað fakliga, men hetta er ikki nakað, sum skúlaleiðarin og hin lærarin nevna.

Skúlaleiðarin fortelur, at tá landsroyndin er liðug, so tekur hann lærararnar ein og ein inn til eitt prát, har úrslitini hjá næmingunum verða gjøgnumgingin. Skúlaleiðarin sigur, at hann og lærarin leggja serliga til merkis, um tað er onkur næmingur, sum hevur fingið eitt lágt úrslit. Tað fyrsta, sum skúlaleiðarin spyr í einum sovorðnum føri, er, hvussu næmingurin klárar seg til dagligt. Síðani kanna skúlaleiðarin og lærarin, um tað er okkurt serligt øki, har næmingurin er veikur. Skúlaleiðarin sigur, at hann í mest møguligan mun letur lærararan føra orðið til hesar samtalur. Eftir ein fund millum skúlaleiðaranum og teir einstøku lærararnar, verða næmingarnir ein og ein og teirra foreldur kallaði inn til fundar. Á tí fundinum verður fyrst hugt at úrslitinum saman, og so verður tosað um, um tað er eitt serligt øki, har næmingurin er veikur. Síðani verður tosað um, hvat lærarin skal gera fyri at bøta um førleikarnar hjá næminginum á hesum økinum, og so verður heitt á foreldrini um at venja hetta økið serliga nógv heima. Skúlaleiðarin sigur, at foreldrini eru vælnøgd við at fáa hesa nágreiniligu afturmeldingina. Skúlaleiðarin sigur: *"Tað dámar foreldrunum øðiliga væl. Foreldrini eru øðiliga glað. Foreldrini dáma ógvuliga væl, at tú hevur nakað fakta á borðinum. Hetta er ikki gitingar. Hetta er ikki, tí tú heldur "at tú er bara fitt, og tú eigur at klára teg betur enn hetta her". Hetta er tað, barnið hevur presterað."* Til endans á fundinum takkar skúlaleiðarin fyri tann góða innsatsin, sum foreldrini gera, og so er

tað er oftast, at foreldrini nýta høvi eisini at siga takk til teir góðu lærararnar, sum barnið hevur.

Ein broyting í 2016 í fyriskipanini av landsroyndini ger, at næmingarnir beinanvegin aftan á royndina fáa at vita frá talgildu telduskipanini, hvussu tað hevur gingist hjá teimum. Men skúlaleiðarin sigur, at hann fer álíkavæl at halda fast í eftirmetingarfundirnar við lærararnar og eftirmetingarfundirnar saman við foreldrunum og næmingum.

## Endi

Sum heild kann sigast, at hjá tí fyrra skúlaleiðaranum miðsavnar námsfrøðiligi leiðslustílurin seg um tvey økir, ið beinleiðis ávirka næmingarnar. Tað fyrsta økið er, hvussu skúlaleiðarin í samsvari við námsfrøðiliga profilin demokratiskt leiðir lærararnar. Tað seinna økið er, hvussu skúlaleiðarin leggur dent á, at lærararnir hava ein felags konsensus til atferðartrupulleikar.

Hjá tí seinna skúlaleiðaranum kann námsfrøðiliga leiðslan býtast í tvey. Fyri tað fyrsta vil hann, at øll skulu trívast á skúlanum, og at tað er pláss fyri øllum, eisini teimum við breki. Fyri tað næsta, so skal hvørt barn klára seg so væl fakliga, sum til ber.

Sjálvt um námsfrøðiliga leiðslan hjá hesum báðum skúlaleiðarum er lýst ymist, so kann sigast, at báðar lýsingarnar hava tað í felag, at skúlaleiðararnir ikki hava ein góðan samanhang í teirra námsfrøðiligu leiðslu, tá hugt verður samstundis at, hvat leiðararnir og teir báðir lærararnir siga. Men tað skal ongin ivi vera um, at hesir skúlaleiðarar útinna nógv ymisk virksemi, sum kunnu bólkast undir námsfrøðiligt leiðsluarbeiði. Til tess at hugkveikja føroyskar skúlaleiðarar í at fáa ein betri samanhang í teirra námsfrøðiligu leiðslu, havi eg í einari aðrari grein lýst tríggjar yvirordnaðar leistir í námsfrøðiligari leiðslu (Miðskarð, 2016).

## Keldur

Alvesson, M., & Sköldberg, K. (2004). *Tolkning og reflection – vetenskapsfilosofi och kvalitativ metod*. Lund: Studentlitteratur.

Arendt, H. (1958). *The Human Condition*. Chicago: Chicago University Press.

Arendt, H. (1978). *The Life of the Mind*. San Diego: Harcourt Brace Jovanovich.

Cohen, L. Manion, L. & Morrison, K. (2011). *Research Methods in Education (7. útgáva*). London: Routledge.

Harris, A., Day, C., Hopkins, D., Hadfield, M., Hargreaves, A. & Chapman, C. (2002). *Effective Leadership for School Improvement*. London: Routledge.

Hopkins, D. (2002). Instructional Leadership and School Improvement. Í A. Harris, C. Day, D. Hopkins, M. Hadfield, A. Hargreaves & C. Chapman, *Effective Leadership for School Improvement (School Leadership Series)* (s. 55-71). London: Routledge.

Justesen, L. og Mik-Meyer, N. (2010). *Kvalitative metoder i organisations- og ledelsesstudier.* Keypmannahavn: Hans Reitzels Forlag.

Miðskarð, J. (in review). Discrepancies between principals' and teachers' perspectives of how the principals carry out their pedagogical leadership.

Miðskarð, 2016. Yvirordnaðir leistar til námsfrøðiliga leiðslu. Tórshavn: Heimasíðan hjá Skúlablaðnum, Føroya Lærarafelag.

Miðskarð, J. (2012). *Action and thinking. An investigation of how social workers' consulting sessions influence school professionals' further perspectives on issues in vulnerable children's lifeworlds.* Ph.d.-ritgerð á Institut for psykologi og uddannelsesstudier. Tikið niður 17.11.2016 frá http://diggy.ruc.dk:8080/bitstream/1800/13000/1/Midskard_2012A.pdf

Moos, L. (2003). Ledelse af skolens relationer. Í L. Moos, *Pædagogisk ledelse –om ledelsesopgaven og relationer i uddannelsesinstitutioner* (s. 81-103). Keypmannahavn: Børsens forlag.